


## Lega fyri støk

Í døgunum 14. til 16. mai 2010 verður lega fyri støk á Zarepta í Vatnsoyrum. Legan er fyri øll støk, ið eru 30 ár og eldri, bæði tey, ið eru vorðin støk, og tey, sum altíð hava verið tað. Børnini eru vælkomin við, og skipað verður fyri nógvum aktiviteti fyri tey. Endamálið við hesi leguni, ið hevur verið á Zarepta á hvørjum ári síðan 1999, er, at støk kunnu hugna sær saman og verða uppbygd andaliga. Evnið á leguni hesaferð verður. Endamálið við hesi leguni, ið hevur verið á Zarepta á hvørjum ári síðan 1999, er, at støk kunnu hugna sær saman og verða uppbygd andaliga. Evnið á leguni hesaferð verður »Søgur, ið mynda okkum«. Meira kunning á www.zarepta.fo

# 40% dýrari

**BYGGING** Tað eru ikki bara fyrimunir við at bjóða almenna bygging út í fría kapping. Tað staðfestir Landsverk í ársfrágreiðing síni, sum akkurát nú er liðug

Áki Bertholdsen




*Almennar verkætlanir, sum vórðu bjóðaðar út í fríari kapping í teimu góðu tíðunum, blivu sum heild ov dýrar og summar blivu alt ov dýrar, sigur Oyvindur Brimnes. Tað er Skúladepilin í Suðuroy eitt gott dømi um*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Í eini viðmerking til frágreiðingina staðfestir Oyvindur Brimnes, at hesi seinastu árini er Landsverk farin at bjóða fleiri og fleiri almennar verkætlanir út til privata arbeiðsmarknaðin at kappast um.

Úrslitið at hesum er, at í dag verða yvir 95% av øllum almennum arbeiðum, sum Landsverk stendur fyri, boðin út í almenna kapping.

Tað einasta, sum Landsverk ger sjálvur, eru smáarbeiði, sum eru so lítil, at tað er ikki ómakin vert at at gera útbjóðingartilfar.

Ein trupulleiki er, at í einum einum lítlum landi eru játtanirnar so lágar og óstøðugar ár um ár, at skal alt bjóðast út, kann tað hava við sær, at meginparturin av játtanini verður brúkt til útbjóðingartilfar.

– Men ein orsøk til, at Landsverk sjálvur ger ávís arbeiði, er fyri at varðveita førleikan á stovninum til at byggja, heldur enn at sleppa endanum heilt, sigur Oyvindur Brimnes.

## » Tað er verri enn so altíð ein fyrimunir at bjóða eina verkætlan út í fría kapping

### Kostar nógv meiri

Hjá summum er tað ein turkatrúgv, at bara eitt arbeiðið verður bjóðað út í almenna kapping, verður tað av sær sjálvum nógv bíligari enn vissi Landsverk skuldi bygt sjálvur.

Endamálið hjá Landsverki við at bjóða út er eisini, at tá fæst altíð mest fyri pengarnar.

Men Oyvindur Brimnes ásannar, at tað eru verri enn so altíð ein fyrimunir at bjóða eina verkætlan út í fría kapping.

– Ein tann størsti trupulleikin er, at marknaðurin í Føroyum er lítil. Vandin fyri privatmonopolum, duopolum ella manglandi kapping er tískil serstakliga stórur í Føroyum.

Hann staðfestir, at viðhvørt førir hetta við sær, at ymsar verkætlanir eru blivnar nógvar ferðir dýrari, enn tær vórðu mettar at kosta

Hann sigur, at dømi eru um, at tað almenna hevur goldið eini 40% ov nógv fyri eina verkætlan av tí at hon varð bjóðað út.

Útbyggingin av Landssjúkrahúsinum er eitt dømi um tað. Skúladepilin í Suðuroy er eitt annað dømi. Men sum heild vóru allar verkætlanir, sum vóru bjóðaðar út í teimum góðu tíðunum ov dýrar og summar vóru alt ov dýrar, sigur hann.

Tað førdi so aftur við sær, at ov lítið fekst fyri pengarnar, sum vórðu settir av á fíggjarlógini.

Hinvegin ger tað øvugta seg eisini galdandi, tá ið tíðirnar eru vánaligar. Tað er útbyggingin av flogvøllinum eitt gott dømi um.

### Ikki í blindum

Oyvindur Brimnes mælir til at vit ikki í blindum fylgja sama leisti sum í størri londum, har heilt aðrar fortreytir gera seg galdandi.

Ístaðin mælir hann til, at vit velja loysnir, sum hóska seg best til tann føroyska veruleikan.

– Ismur og politikkur mugu ongantíð blíva ein trúarspurningur. Politiski myndugleikin eigur heldur at skapa brúkiligar karmar, sum arbeitt verður innanfyri við viti og skili, sigur Oyvindur Brimnes.

*aki@sosialurin.fo*

# Nógv dýrast í Suðuroy

**BYGGING** Tað kann verða rættiliga stórur munur á, hvat ein verkætlan kostar at gera, alt eftur um bygt verður í góðum ella ringum tíðum

Áki Bertholdsen

Í ársfrágreiðing síni nevnir Landsverk, at fyribils verður skúladepilin í Marknagili mettur at kosta 21.000 - 23.000 krónur fyri fermeturin at byggja.

Í Klaksvík kostaði tað 18.000 krónur fyri fyri fermeturin at byggja Tekniska skúla út.

– Men taka vit so Miðnámsskúlan í Hovi, sum er bygdur, meðan stór ferð var á búskapinum, táttaði prísurin fyri hvønn fermetur fast í 30.000 krónur.

– Í tí verkætlanini gjørdi tað seg harafturat galdandi, at áhugin fyri hesi byggiuppgávu var næstum ongin. Leggur Landsverk afturat.

Hann sigur, at ein tummilsregla í sambandi við eina størri byggiætlan, er, at grundøkið, trygging, prosjektering og ráðgeving annars, byggileiðsla, fakligt eftirlit og ymiskt annað fara við umleið 20 prosentum av kostnaðinum, men hini 80 prosentini fara til sjálva byggingina, altso til tilfar og handverkarar.

Harumframt kann ognartøka tíðum vera ein luftalsliga stórur fíggjarpostur og harafturat kemur so tað, at byggilendið er dýrkað nógv seinnu árini.

*aki@sosialurin.fo*